# Føroyskur bátur siglingarloyvi í Keypmannahavn

**Tað var ein hátíðarlig løta, tá Niels "Sømand" Pedersen ólavsøkuaftan fekk handað føroyska flaggið og siglingarloyvi til seksæringin Norðbúgvin, ið er fyrsti báturin, skrásettur undir føroyskum flaggi við siglingarrættindum í havnini í Keypmannahavn**


*Tað var ein hátíðarlig løta, tá føroyski sendimaðurin í Keypmannahavn, Herálvur Joensen, handaði Niels "Sømand" føroyska flaggið til Norðbúgvan*

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nakað síðani keyptu danir, ið eru fegnir vilja fáa "Føroyar til Danmarkar", seksæringin Norðbúgvin av Toftum, ið er bygdur í 1956. Seinastu mánaðirnar hevur danski bátabyggjarin Per Brandt Møller umvælt bátin frá innast til uttast.

### Stuttlig avbjóðing

Tað var hansara barndómsvinur, Niels Pedersen, betri kendur sum Niels Sømand, sum heitti á Per Brandt Møller um at umvæla bátin.

– Eina so øðrvísi og stuttliga avbjóðing sigur tú ikki nei til, sjálvt um báturin var í sera ringum standi, sigur Per, ið sum eitt tað fyrsta valdi at klæða skrokkin við glastrevju.

– Alt annað hevði verið ábyrgdarleyst, um upprunaligi skrokkurin skuldi varðveitast. Men nú er báturin í allar mátar sjógóður. Sniðið stavar frá víkingabátunum, og víkingarnir vistu hvat teir gjørdu, sigur Per, sum brúkti einar tríggjar mánaðir at umvæla bátin.

### Virðiligt minni

Ólavsøkuaftan var løtan so komin, tá umboð fyri føroyskar mynduleikar handaðu einum glaðum og ikki sørt rørdum skipara á bátinum, Niels Sømand, føroyska flaggið og siglingarloyvi til bátin.

Eftir at hava silgt sólarringin runt tríggjar ferðir, varð Norðbúgvin alt fyri eitt tikin í nýtslu, og siglir hann nú við ferðafólki runt í Kanalini. Pláss er fyri 22 fólkum umborð, og fáa ferðafólkini eisini ein góðan føroyskan bita á túrinum. Hetta er fyrstu ferð, at ein bátur, sum er skrásettur undir føroyskum flaggi, hevur fingið slík siglingarrættindi í havnini í Keypmannahavn.

Tá báturin ikki verður brúktur sum ferðamannabátur, er ætlanin, at hann skal hanga í gálga á Bryggjuni sum eitt virðiligt minni um tíðina, tá føroyingar róðu út í Grønlandi.


*Norðbúgvin siglir nú sum ferðafólkabátur í Kanalini í Keypmannahavn*


*- Eina so áhugaverda uppgávu sigur tú ikki nei til, sigur bátabyggjarin, Per Brandt Møller, sum hevur umvælt Norðbúgvan*

# Ólavsøkan týdning fyri Bryggjuna

**Stjórin á Bryggjuni, Helga Hjørvar, fegnaðist um góðu undirtøkuna av ólavsøkuhaldinum, sum hon heldur hava stóran týdning fyri myndina av Bryggjuni úteftir**

Í gott eitt ár hevur fyrrverandi stjórin í Norðurlandahúsnum, Helga Hjørvar, virkað sum stjóri á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn, har sendistovurnar hjá Íslandi, Grønlandi og Føroyum húsast. Helga fegnast um, at stig vórðu tikin til at fáa ólavsøkuhaldið út á Bryggjuna fyri trimum árum síðani.

– Bryggjan er ikki bara eitt nátúrligt men eisini eitt framúr gott umhvørvi fyri ein slíkum tiltaki. Ólavsøkuhaldið hevur eisini stóran týdning fyri mátan vit markera Bryggjuna úteftir, sigur Helga. Hon ásannar, at mentanarlig tilboð ikki júst eru ein mangulvøra í Keypmannahavn. Tí hava tey lagt serliga nógva orku í at markera stovnin á ein hátt, sum letur eyguni upp fyri serstøku norðuratlantisku mentanini.

– Samanumtikið hevur hetta eydnast sera væl. Tað er blivið alsamt meir populert at vitja Bryggjuna, og tiltøkini fáa góða undirtøku, sigur Helga, sum dámar sera væl í starvinum.

– Tað býr jú eitt ótrúligt potentiale í einum so serstøkum bygningi. Meneisini sum kunningarmiðdepil hevur Bryggjan fingið ein týdningarmiklan leiklut fyri bæði virki og einstaklingar, sum samstarva við londini, sum eru umboðaði í húsinum, sigur Helga Hjørvar.

**ave**


*Helga Hjørvar, stjóri á Bryggjuni, tók sær av løttum og hugnaði sær saman við mongu ólavsøkugestunum*

# Jesper vann plakatkappingina



*17 ára gamli Jesper Cidlik var sera ovfarin og glaður, tá hann fekk boð um, at hann hevði vunnið plakatkappingina til ólavsøkuhaldi 2006 á Bryggjuni*

**- Eg kendi onki til Føroyar, men helt avbjóðingina síggja sera spennandi út, sigur 17 ára gamli Jesper Cidlik úr ejle, sum vann plakatkappingina, sum varð útskrivað í sambandi við ólavsøkuna 2006 í Keypmannahavn**

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fyri at geva ólavsøkuhaldinum í Keypmannahavn eitt gjøgnumgangandi sjónligt eyðkenni, útskrivaði stýrisbólkurin herfyri eina plakatkapping. Einastu krøvini vóru, at yvirskriftin "Ólavsøkan 2006" umframt føroyska flaggið á onkran hátt skuldi hava pláss á plakatini.

### Kannaði bøkur um Føroyar

Í eini skúlastovu í Vejle fekk 17 ára gamli Jesper Cidlik eyga á lýsingina fyri kappingina ein dagin hann sat og leitaði á netinum.

– Eg plagi at halda eyga við slíkum kappingum, tí tær hava ofta onkrar stuttligar og øðrvísi avbjóðingar við sær, sigur Jesper, sum dámar sera væl at arbeiða við grafiskum myndum og sniðum á teldu.

Tað einasta, Jesper visti um Føroyar, var at lundin er ein rættiliga vanligur fuglur har, og at hann ofta verður brúktur á postkortum.

– Lundan vildi eg hava við, tí litirnir og skapið hóska væl til grafisk snið av hesum slag. Restina, so sum litirnir annars og sóljurnar havi, eg funnið fram til í bókum um Føroyar, sum eg lænti á bókasavninum, sigur Jesper, sum samstundis gørdist sera forvitin eftir at sleppa at uppliva hetta landið. Tí var hann eisini serliga fegin um vinningin, sum var ein flogferð frá Atlantic Airways fyri tvey aftur og fram til Føroyar.

– Eg fari at bjóða pápa mínum og einum vinmanni við. So mugu vit bara finna eitt tíðspunkt, tá tað er gott veður í Føroyum, smílist Jesper, sum fer undir útbúgving sum miðlagrafikari aftaná summarfrítíðina.